

Teir eru ikki dagliga saman og venja, men tað hoyrdist ikki á framførslu teirra. Royndirnar, saman við tónlistarligum hegni sermerkja framvegis manningina í bólkinum.

# I Am er har framvegis

BÓLKUR

Snorri Brend

Í hesum mánaðinum eru júst liðin 10 ár síðani tónleikahugaðir menn tóku seg saman í bólkinum við navninum I Am. Við eyðkenda stíli sínum hugtóku teir serliga tey ungu. Framførsla teirra í kvøld vísti, at teir eru vorðnir likamliga eldri, men inspirasjónin, sanggleðin, útstrálingin og hugurin at frambera sang og tónleik eru einki viknað hesi árini. Heldur ikki dugnaskapurin at fáa fólkið við í framførsluna!

Sum altíð, var I Am borið fram av karismatiska sangaranum, Birgir, her teir framførdu teir bæði nýggj løg og nøkur av teimum gomlu.

Tá konsertin var nærum at enda komin boðaði Birgir frá, at nú varð seinasti sangurin á skránni. Hetta fall ikki ungu áhoyrarunum væl í oyra, og tey kravdu fleiri sangir.

– Lurtaraynskini, - tey koma vit til aftaná!, boðaði Birgir frá.

Seinasta lagið varð sungið, og síðani tóku teir eitt av áhoyraraynskjunum til eftirtektar: Teir tóku aftur í eitt av kendu løgum teirra. Og hetta dámdi áhoyrarunum sum vera man væl.

Teir prógvaðu til fulnar at teir duga framvegis. Tónleikurin situr bara í ryggmerginum - og tað fekst fullgott prógv fyri tí í kvøld.

Tað var hart. Tað var gott. Tað hoyrdist. Og tað sat!



# 2500 fólk til sang og tónleik

Fyrsti Fjarðafestivalurin endaði seint sunnunáttina. Nakað frammanundan kundu fyrireikararnir gleðast um og kunngera, at eini 2500 fólk vóru í Skálafirði um vikuskiftið.

Tað er altíð spennandi at skipa fyri einum nýggjum tiltaki, ið eingin annar hevur royndt áður. Men fyrireikararnir hava ikki fyri neyðini at skammast, hvørki við fyrireiking ella undirtøku.

Fríggjakvøldið segði ein av fyrireikarunum við útvarpið at teir vóru ovfarnir av, hvussu nógv atgongumerki vóru seld.

– Vit hava í roynd og veru selt fleiri atgongumerki enn væntað, varð sagt frammanundan. Nú fyriliggja so endaligu tølini.
Og hesi munnu helst geva fyrireikarunum íblástur til ein líknandi festival komandi ár!



# Proclaim í stórformi

Proclaim spældi eina sannførandi konsert á Fjarðafestivalinum. Við vælsvingandi og hendingaríkum tónleiki, fekk Proclaim rættiligt lív í salin. Talan er um sera dugnaligar og spennandi tónleikarar, sum vit óivað fara at hoyra nógv frá í framtíðini.

Tónleikurin hjá Proclaim er fjølbroyttur. Men sum eitt felagsheiti kundi ein sagt, at talan er um New York Gospel tónleik, soleiðis sum hann ljóðaði í 80unum. Altso tosa vit um funky og hendingaríkan tónleik.

Løgini eru á tremur við tónlistarligum góðbitum. Har eru nógvir smálutir og nógvar breaks, sum sita heilt væl. Sostatt hoyrir tú at bólkurin er í góðari venjing.

At byrja við helt eg, at tónleikur og tekstur fóru hvør sín veg. Haldi tað var í fyrsta lagnum, hvar ið tónleikararnir spældu heitt og vakurt, meðan teksturin snúði seg um meiri "blóðug" og myrk viðurskifti. Hetta helt eg vera sera løgið, men tá sá ikki út til at ørkymla nakran annan enn meg.

Eg haldi at Proclaim skulu arbeiða meiri við melodium, og eisini royna at fáa tað sum onglendingar rópa "creative control". Eg saknaði meiri natúrligar melodiir í løgunum. Samanumtikið helt eg at melodiirnir í versunum vóru mestsum kroystir inn, meðan niðurløgini eru meiri "singalong" kend.
Eisini føldi eg onkuntíð, at bólkurin gloymdi at vera eyðmjúkur yvirfyri tónleikinum. Tað tóktist sum, teir spældu nógv; bara fyri at spæla nógv, heldur enn at leita eftir eini hóskandi instrumentering, sum hevði klætt lagnum betur. Um teir fáa tamarhald á sínum kreativitetið, so ímyndi eg mær, at Proclaim verður Føroya gospel bólkur #1.